## Mannaát í Russlandi

Í Russlandi hevur løgreglan tikið tveir 19 ára gamlar menn, tí illgruni er um, at teir hava myrt eina 16 ára gamla gentu og etið partar av henni. Blaðið Komskomolskaja Pravda skrivar, at løgreglan skuldsetir teir báðar ungu menninar fyri at hava druknað gentuna í einum baðikari heima í íbúðini hjá øðrum manninum í St. Pætursborg tann 20. januar. Seinni skulu teir hava steikt partar av líkinum og etið teir. Eitt blað í St. Pætursborg veit at siga, at menninir hava viðgingið ta óhugnaligu gerðina.



## Metarbeiðsloysi í Spania

Í Spania eins og aðrastaðni veksur talið á arbeiðsleysum støðugt, og í gjár kunngjørdi hagstovan í Madrid, at um mánaðarskiftið vóru meiri enn 3,3 milliónir spaniumenn skásettir sdum arbreiðsleysir. Sambært hagstovuni er hetta tað størsta talið tey seinastu tólv árini. Tølini hjá hagstovuni vísa, at talið á arbeiðsleysum vaks 6,35 prosent frá desember til januar og heili 47,1 prosent frá januar í fjør til januar í ár. Tað merkir, at meiri enn ein millión spaniumenn hava mist arbeiðið tað seinasta árið, skrivar Reuters.

# Maskinistútbúgvingin er lívsneyðug

**Maskinmeistarafelagið ger í skrivi vart við sína meining í samband við at Vinnuháskúlin verður raktur av sparingum. At útbúgva maskinistar er lívsneyðugt fyri føroyska samfelagið, sigur formaðurin í Maskinmeistarafelagnum**

SPARINGAR
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*



*Ein fylgja av sparingum, er at Vinnuháskúlin má spara burtur maskinistútbúgvingina*

Vinnuháskúlin sleppur ikki snikkaleysur undan sparingum. Í gjár boðaði Maskinmeistarafelagið, at sparingarnar fara at hava við sær at vit fáa færri útbúnar maskinistar.

- Tað var ein stórur trupulleiki fyri nøkrum árum síðan, tá vit høvdu eina junglu av undantaksloyvum, orsaka av at ov nógvir óútbúnir maskinistar starvaðust sum maskinistar. Tí trupulleikanum eru vit sloppin undan, nú vit hava so nógvar útbúnar maskinistar, sigur Páll Lassen, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum sigur, at útbúgvingin á Vinnuháskúlanum gevur rættindi upp til 2999 kW, sum er nøktandi fyri allan føroyska fiskiflotan, umframt at føroyskir maskinistar egna seg til sigla sum maskinstjórar við øðrum smærri skipum og sum 2. meistarar við stórum skipum. Harafturat geva útbúgvingarnar rættindi til altjóða viðurkend vinnubrøv, soleiðis at viðkomandi kunnu mynstra við einum og hvørjum skipi kring allan heimin. Stjórin í Maskinmeistarafelagnum leggur dent á, at maskinistútbúgvingin er ein útbúgving, sum er eftirspurd kring allan heimin.

Á leið 15 maskinistar eru á hvørjum holdi, og seinnu árini hevur eingin trupulleiki verið við at fylla holdini. Nú Vinnuháskúlin verður raktur av sparingum, verður einki hold við maskinistum upptikin í summar.

- Eg vil siga, at tað er lívsneyðugt fyri føroyska flotan, at Vinnuháskúlin heldur fram við at útbúgva maskinistar, sigur Páll Lassen, stjóri á Maskinmeistarafelagnum.

## Vinnuháskúlin má spara burtur útbúgving

**Eitt úrslit av sparingum er, at Vinnuháskúlin noyðist at spara burtur maskinistútbúgvingina. Tað er óskiljandi, heldur stjórin, tí eftirspurningurin eftir maskinistum er stórur, og inntøkurnar til landskassan høgar**

SPARINGAR
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Eftir at umsóknin frá Vinnuháskúlanum fyrst var viðgjørd í Mentamálaráðnum og síðan í Løgtinginum, varð greitt at sparingur mugu fremjast í Vinnuháskúlanum. Skúlin manglar tvær milliónir til rakstur av Vinnuháskúlanum og deildina við Áir. Sparingarnar hava við sær, at fólk eru søgd úr starvi, og at maskinistútbúgvingin verður spard burtur.

- Vit hava gjørt eitt uppskot um at leggja saman flokkar, og at niðurleggja maskinistútbúgvingina á skúlanum. Fyri at fáa fíggjarætlanina at ganga upp, hava vit verið noydd til at siga lærarum úr starvi, samstundis sum fólk úr umsitingini hava fingið uppsagnarbræv, sigur Hans Jóhannus á Brúgv, stjóri.

Tað, at maskinistútbúgvingin dettur burtur, hongur als ikki saman, sigur Hans Jóhannus á Brúgv, tí eftirspurningurin er so stórur eftir maskinistum.

- Tað er óskiljandi at niðurleggja útbúgvingina, tí við útbúnum maskinistum vinna allir partir. Hetta er somuleiðis ein stór inntøka fyri landskassan. Eg meini at Kaj Leo Johannesen sjálvur hevur mett at maskinistar vinna landskassanum millum 200-300 milliónir árliga, sigur hann.

Ætlanin hjá Vinnuháskúlanum var at útbyggja útbúgvingarnar til bachelor støði, men tað má nú sleppast. Tað er harmiligt, metir skúlastjórin, tí vit eiga at halda støðið í flotanum, okkara fólk arbeiða.

Skúlastjórin á Vinnuháskúlanum leggur afturat, at tað er ein stórur trupulleiki fyri stovnar sum Vinnuháskúlan, at lønir á hvørjum ári vaksa, men at játtanirnar ikki vaksa samsvarandi.

# 40 vilja verða politi

**Nú umsóknarfreistin fyri politistaevni var úti 31. januar, vóru 40 umsóknir komnar inn. Politiið í Havn sigur, at talið á umsøkjarum er hægri í ár enn undanfarin ár. Nógv eru sostatt um boðið, tí einans fýra pláss eru til nýggju politistaevnini**

ÚTBÚGVING
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*




*Áhugin fyri politiútbúgvingini er vaksandi. 40 hava søkt um upptøku, í mun til tey vanligu 20-30*

40 umsóknir komu inn til løgregluna í Havn, nú umsóknarfreistin var úti 31. januar. Møguleiki er fyri at søkja alt árið, men í Føroyum vísir tað seg, at fólk ikki søkja fyrr enn løgreglan søkir eftir evnum.

- Í ár hava vit fýra pláss til nýggj politistaevni, og til hesi fýra plássini, eru 40 umsóknir komnar inn. Tað er nakað hægri enn undanfarin ár, tá millum 20-30 hava søkt, sigur Jákup Alberg Berg, løgreglumaður.

Plássini, føroyska løgreglan hevur at ráða yvir, eru pláss hon hevur forhandlað seg til í samráð við donsku løgregluna. Tað verður regulerað eftir hvussu nógv løgreglufólk eru í starvi, og hvussu stór væntaða frágongdin verður.

Av ymsum orsøkum verður vanliga ein triðingur av umsóknunum sáldaður frá beinanvegin. Tað kann vera orsakað av aldri, ivasamari fortíð ella sjúku. Til ber til dømis ikki at vera løgreglufólk, um ein hevur sjúku í eygunum, ella hevur okkurt slag av skaða at dragast við. Sambært reglunum hjá donsku løgregluni, skal umsøkjarin verða fyltur 21 ár, og hann skal ikki vera eldri enn 29. Frávik kunnu koma fyri, men er umsøkjarin eldri enn 31 ár, verður hann ikki boðin til víðari royndir, uttan so at talan er um serligar umstøður.

- Serligar umstøður í hesum føri kunnu vera um viðkomandi hevur arbeitt innan verjuøkiðáður. Men høvuðsorsøkin til at umsøkjarar ikki skulu vera ov gamlir, er orsakað av longdini á útbúgvingini. Tað skal 12 ára skúlagongd innan økið til, áðrenn løgreglufólk kunnu fara leiðaravegin, sigur Jákup Alberg Berg.

Av teimum 100 løgreglufólkunum í Føroyum, eru 10 kvinnur. Millum teir 40 umsøkjararnar eru átta kvinnur.

- Vit taka ikki hædd fyri kynunum, tá vit taka umsøkjarar inn. Tey, ið verða mett at hava ein møguleika, skulu gjøgnumføra somu kropsligu royndir, umframt at tey skulu gjøgnumføra eina roynd í føroyskum.

Umframt aldursmark, eru reglar fyri hvussu høgur umsøkjarin er, at hann hevur koyrikort, góða heilsu, er kropsliga væl fyri, umframt at rein revsiváttan krevst.